Elsa Waage, operasangarinda:

# Vitjað í Føroyum alt lívið

**Elsa Waage er ein av forkunnugu gestunum, sum vitjar í Føroyum í sambandi við Listastevnuna 2002. Hon er her saman við manni, dóttir og klaverspælaranum, Giulio Zappa**



*Elsa Waager og Giulio Zappa eru í Føroyum í sambandi við Listastevnuna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

LISTASTEVNAN 2002
*Ingrid Bjarnastein*

Upprunaliga er Elsa Waage úr Íslandi, og harafturat er hon hálvur føroyingur. Mamma hennara er ættað av Selatrað.

Elsa Waage er í Føroyum í sambandi við Listastevnuna. Saman við manni, dóttir og klaverspælaranum Giulio Zappa roynir hon eisini at njóta føroyska lívið enn einaferð. Tí sum barn vitjaði Elsa nevniliga rættiliga nógv í Føroyum.

– Fyrr dugdi eg rættiliga væl at tosa føroyskt, men tað geri eg ikki longur, sigur Elsa flennandi, og vendir síðani beinanvegin aftur til tað italienska.

– Eg plagdi at vitja í Føroyum tá eg var lítil við mammu míni. Har vitjaðu vit langommu mína á Selatrað, og mær hevur altíð dámað ógvuliga væl her.

### Yvirraskaður

Klaverspælari hennara, Giulio Zappa, hevur debut í Føroyum – og í Skandinavia yvirhøvur.

– Eg eri glaður fyri at vera komin í eitt so forkunnugt stað. Her er vakurt, og eg var veruliga yvirraskaður av tí, sigur Giulio Zappa, sum er úr Milano í Italia.

– Eg havi ongantíð verið í Skandinavia fyrr, og eg eri ógvuliga glaður fyri at vera komin her nú. Serliga saman við Elsu, sum hevur røtur hiðani.

Elsa Waager býr í einum lítlum býi nær Como, sum er tætt við Milano. Hon og Giulio spæla og syngja ofta saman í Italia. Og í Italia hevur Elsa búð í samfull níggju ár.

– Mær dámar best at spæla til konsertir, sigur Elsa. – Serliga nú, tá eg havi fingið eina dóttir, so dámar mær ikki at vera burtur í ov long tíðarskeið í senn.

Maðurin, sum er úr Italia, og dóttirin eru við í Føroyum. Tá vit tosaðu við Elsu og Giulio, var dóttirin á Selatrað, har hon fær møguleikan at síggja alt tað, mamman upplivdi sum barn.

Elsa Waager og Giulio Zappa skulu spæla til setanina av Listastevnuni. Har fer hon at syngja Erdas Warnung úr operuni Das Rheingold eftir Wagner. Sunnudagin skal vera konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Har fer hon at framføra íslendskar og aðrar norðurlendskar sangir, og endar sjálv konsertin við musical-brotum, sum Elsa er ein stórur fjeppari av.

Listastevnan 2002:

# Leggja seinastu hond á fyrireikingarnar

LISTASTEVNAN 2002
*Ingrid Bjarnastein*

Listastevnan 2002 verður sett í dag klokkan 14.00. Fyrrapartin í gjár varð ein seinasta hond løgd á allar fyrireikingarnar, og var ein rúgva at gera uppi í Norðurlandahúsinum.

– Vit eru klár til setanina í morgin, sigur Birgir Kruse, stýrisformaður fyri Listastevnuna 2002.

– Her er ein rúgva at gera, og fleiri fólk hava ringt inn við fyrispurningum. Tiltøkini eru so fjølbroytt og ymisk, so tað eru nógvir ymiskir fyrispurningar. Spurt verður um alt frá ølskeinking til bussútleigan.

Fyrrapartin í gjár vóru eisini ein rúgva av fólki uppi í Norðurlandahúsinum. Bæði útlendingar og føroyingar, sum fyrireika Listastevnuna gingu og mólu um beinini á hvør øðrum.

Ein persónur er settur av at taka ímóti og innkvartera teir ymsu gestirnar, og hevði hon úr at gera henda morgunin fyri Listastevnan fer av bakkastokki.

Men ongin ivast. Listastevnan verður klár at seta í dag klokkan 14.00.



*Tað er úr at gera uppi í Norðurlandahúsinum í hesum døgum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Burturhugur á Kuba



*Nýggir filmurin hjá Teiti Árnasyni fer at lýsa gerandisdagin hjá fýra tilvildarligum persónum á Kuba. Filmurin ber sama heiti sum filmurin um Hattarvík, nevniliga Burturhugur*

**Teitur Árnason hevur latið sín næsta film úr hondum. Hetta er eitt slag av framhaldi av tí fyrra filminum, sum snúði seg um gerandislívið í Hattarvík. Oyggin Kuba er hesuferð karmur um filmin, sum verður frumsýndur í Havnar Bio í dag**

FILMUR
*Stefan í Skorini*

Seinastu mánaðirnar hevur føroyingurin Teitur Árnason sitið við sveittabroti og klipt næsta film sín. Hann hevur sama heiti sum tann fyrri, nevniliga Burturhugur. Undirheitið hesuferð er Observaciones de Cuba ella eygleiðingar av Kuba.

– Hesin filmurin er meira litfagur enn tann fyrri, har eg royndi at lýsa einsemi og avbyrging úti í Fugloy. Fólkini, sum verða lýst í filminum, eru væl skorin fyri tungubandinum, og tónleikurin hevur ein stóran leiklut í filminum, segði Teitur Árnason áðrenn hann fríggjadagin settist í flogfarið í Kastrup við kós móti Føroyum.

### Gerandismyndir

Filmurin snýr seg um fýra persónar á Kuba, og hyggjarin fær innlit í teirra gerandisdag. Í filminum verður fylgt við fiskimanninum Manuel, sjúkrasystrini Raceldu, tónleikaranum Lazarus og yrkjaranum Luis.

– Eg havi ongan ávísan boðskap við filminum, men ætlanin er, at geva fólki høvi at fordjúpa seg í einum fremmandum umhvørvi, sigur Teitur Árnason.

Teitur kennir sjálvur øll tey fýra fólkini, sum eru miðdepil í filminum, persónliga, og hetta er avgerandi fyri tað endaliga úrslitið. Teitur kendi eisini fólkini, sum vóru við í tí fyrra filminum.

– Eg kom at kenna hesi fólkini, tá eg var á Kuba á fyrsta sinni í 1995. Í filminum royni eg at gera eitt portrett av teimum, og nomið verður við ymisk verkevni, sigur Teitur Árnason.

Sjúkrasystirin Racelda býr í høvuðsstaðnum Havana, meðan hinir tríggir, sum eru við í filminum, búgva í einum býi har suðuri í landinum, sum eitur Cienfuegos, ið merkir teir hundrað eldarnir.

### Ein greipa

Filmarnir báðir, sum bera sama heiti, eru á ein hátt ein greipa, men hinvegin eru teir eisini sera ólíkir.

– Filmarnir eru leikstjórnaðir í sama anda og minna um hvønn annan. Teir skulu á onkran hátt vera ein greipa, hóast umhvørvini, sum lýst verða, eru ógvuliga ólík, sigur Teitur.

Teitur hevur tvær ferðir verið á Kuba og tikið upp. Fyrru ferð var fyri meira enn einum ári síðani, men í vetur var hann aftur á tí karibisku oynni og tók upp.

### Nógv tíð

Síðan februar mánað hevur – Tað var neyðugt at rista lív í aftur hetta projektið, tí tað var so langt fráliðið, síðan eg tók tær fyrstu myndirnar. Tí fór eg yviraftur til Kuba í vetur. Á seinnu ferðini havi eg fingið nógv nýtt tilfar, sum eg havi brúkt í filminum, og tað hevur tí bøtt nógv um hann, at eg fór aðru ferð, sigur leikstjórin.

Filmurin miðar ímóti at koma fram á sereyðkenni í hesum samfelagnum, sum liggur so fjart frá øllum, sum vit kenna heimligt. Ætlanin við filminum er eisini, at hann skal geva svar uppá tann fyrra filmin, sum varð tikin upp í Hattarvík.

ungi leikstjórin verið sera upptikin av at klippa upptøkurnar og at fáa tey seinastu tingini uppá pláss.

– Eg havi lagt alla mína tíð í hetta projektið, og seinasta mánaðin hevur tað verið sera hektiskt. Eg eri tó sera væl nøgdur við tað endaliga úrslitið, sigur Teitur.

Teitur hevur havt somu fólk at hjálpa sær við upptøkunum sum til filmin um Hattarvík. Filmurin er 75 minuttir til longdar og verður frumsýndur í dag, leygardagin, klokkan 17 í Havnar Bio.

Sýningin er ein partur av Listastevnu Føroya, sum eisini fer av bakkastokki í dag.



*Sjúkrasystirin Racelda er ein av persónunum, sum vit fylgja í filminum. Her er hon á marknaðinum og keypir grønmeti. Ætlanin er, at hyggjarin skal fáa høvi at fordjúpa seg í einum fremmandum umhvørvi. Allar myndirnar á hesi síðuni eru úr filminum*



*Hóast filmurin av Kuba og filmurin úr Hattarvík lýsa tvey sera ólík univers, so er ætlanin hjá leikstjóranum, at teir kunnu supplera hvønn annan á onkran hátt*